LM-092/2022

Skráseting Føroya

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Sent til teldupostadressu: uvmr@uvmr.fo

Dagfesting: 21. februar 2023
Journal nr.: 23/00032

Viðmerkingar frá Skráseting Føroya til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi.

> ”Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)
> (Ígildissetan av 4. og 5. Hvítvaskdirektivi o.a.)”

Skráseting Føroya hevur fingið omanfyri standandi uppskot til hoyringar tann 6. februar 2023.

Sambært lógaruppskotinum verða ávísar nýggjar umsitingarligar uppgávur lagdar til Skráseting Føroya, sum fara at hava við sær eina størri arbeiðsbyrðu fyri stovnin. Ábyrgdarøki stovnsins verður m.a. víðkað til at fevna um listahandlarar (punkt 57 í lógaruppskotinum, at trust´ar skulu skráseta teirra veruligu eigarar hjá Skráseting Føroya (punkt 8 í lógaruppskotinum), heimild at áseta fyrisitingarlig sektaruppskot eftir nærri ásettum reglum o.a.

Skráseting Føroya staðfestir eisini, at játtanin til Skráseting Føroya sbrt. fíggjarlógar uppskotinum fyri 2023, er raðfest til fyrst og fremst eftirlitsarbeiði sambært hvítvasklógini og grannskoðaralógini.

Skráseting Føroya hevur annars ikki viðmerkingar til tilfarsliga innihaldið í lógaruppskotinum, sum í høvuðsheitum setur í gildi 4. og 5 hvítvaskdirektiv.

Vinarliga

Súsanna Leo
deildarleiðari